# »Fótbóltsskúla-venjari«
# Er hetta ikki júst nakað fyri teg?

**...sigur tú ja, verður tú ein snøggan dýnujakka heitari!!**

Fótbóltssamband Føroya ætlar at skipað fyri fótbóltsskúlum aftur í ár.

Hetta er eitt sosialt tiltak, har børn úr øllum landinum í aldrinum 8–14 ár møtast til tveir upplivingar-ríkar dagar, og er hetta ein líka stór uppliving fyri venjararnar.

Fyri at hetta tiltak skal framhaldandi eydnast væl, so krevst at vit fáa nokk av venjarum og lýsa vit tí eftir venjarum til fylgjandi skúlar:

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 28.06.02 | kl. 13.00 – 18.00 | og | 29.06.02 | kl. 10.00 – 15.00 | í Tórshavn |
| 28.06.02 | kl. 13.00 – 18.00 | og | 29.06.02 | kl. 10.00 – 15.00 | í Vági |
| 28.06.02 | kl. 13.00 – 18.00 | og | 29.06.02 | kl. 10.00 – 15.00 | í Vágum |
| 28.06.02 | kl. 13.00 – 18.00 | og | 29.06.02 | kl. 10.00 – 15.00 | í Klaksvík |
| 05.07.02 | kl. 13.00 – 18.00 | og | 06.07.02 | kl. 10.00 – 15.00 | á Toftum |

Treytir fyri at tilmelda er, at tú hevur tikið minst eitt venjara-grundskeið ella at tú hevur hollar royndir innan venjara-yrki, og at tú ert fylt/fyltur 16 ár.

Freistin at tilmelda er 15. mei 2002, hetta kann gerast við at senda niðanfyri standandi tilmeldingarlepa til FSF, Postrúm 3028, FO-110 Tórshavn, ella at faxa lepan til fax nr. 319079.

✂---------------------------------------------------------------

**TILMELDINGARLISTI**
**Til Føroya Fótbóltsskúla 2002**

**Navn:** ____________________ **Aldur:** ____________

**Bústaður:** ____________________ **Tlf.:** ____________

**Lokið skeið/royndir:** ____________________

**Ynski at vera venjari á fótbóltsskúlanum í/á:** Tórshavn ❑ Toftum ❑ Klaksvík ❑ Vágur ❑ Vágar ❑

**Ynski at venja aldursbólk:** 8–10 ár ❑ 10–12 ár ❑ 12–14 ár ❑

Sendast/faxast í seinasta lagi 15. mei 2002, til:
Fótbóltssamband Føroya • Postrúm 3028 • 110 Tórshavn • Telefax: 319079 • e-postur: gudrid@football.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Pedagogar og hjálparfólk til frítíðarskúlan í Eysturskúlanum

**Størvini**
eru tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna og eitt avloysarastarv í 4 mánaðir, frá 5. august til 29. november 2002, fyri hjálparfólk í farloyvi, 20 tímar um vikuna. Annað pedagogstarvið er varaleiðarastarv.

**Stovnslýsing**
Á frítíðarskúlanum ganga 42 børn, og vit halda til í A-lonini í Eysturskúlanum.

**Tað er týdningarmikið**
at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum, og eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

**Vit leggja stóran dent á**
at vit eru eitt frítíðartilboð til børnini. Vit eru saman við børnunum í teirra frítíð. Vit vilja menna børnini við at lurta, práta og vera saman við teimum.

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 5. august 2002, løn sambært sáttmála millum Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og Føroya Pedagogfelag.

Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkaði størv.

**Meiri fæst at vita um størvini**
við at venda sær til: Barbaru Dahl, leiðara tlf. 314879 ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 315160

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndum skulu vera frítíðarskúlanum í hendi seinast 21 mai. 2002 Setanarsamrøður verða skjótast gjørligt eftir hetta.

SNARSKIVAN


# TØKK

Eina hjartans tøkk til tykkum 134 veljarar í Suðursteymi, ið atkvøddu fyri mær á Fólkaflokslistanum til løgtingsvalið



Annika Olsen

máling & gólv

NAIRN VINYLGÓLV

CLASSIC
* Slitsterkt vinyl
* Stórt úrval
* TILBOÐ:
Ókeypis álagt

4 m breitt:
380kr.
metrin

máling & gólv
við Landavegin
Tlf. 316066

Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

## Bilur til sølu

Við hesum verður ein bilur av slagnum Opel Record lýstur til sølu. Bilurin stendur í Vági.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til undirritaðu.

**ADVOKATSKRIVSTOVAN**
Fr. Petersensgøta 9 • 100
Tórshavn • tlf 311145
**att: Fríða Patursson, adv.**

# Takk

Stóra takk til teir 424 veljarnir í Suðuroy, ið atkvøddu fyri Fólkaflokkinum til løgtingsvalið

Vegna Fólkaflokkin í Suðuroy

Jákup Olsen

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Visti tú ikki tað? Sosialurin




# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi til Barnagarðin við Velbastaðvegin 35 tímar um vikuna, at byrja 1. juni 2002.

Barnagarðurin við Velbastaðvegin er sjálvsognarstovnur og normeraður til 60 børn í aldrinum 3 – 7 ár, býtt sundur í 3 stovur.

Á hvørjari stovu starvast tveir pedagogar og eitt hjálparfólk.

Tann, ið settur verður, skal hava góð samstarvsevnir, vera kreativur, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga at síggja tørvin hjá tí einstaka barninum. Viðkomandi, ið settur verður, skal duga at síggja møguleikarnar í okkara náttúruumhvørvi saman við børnunum.

Løn og setunartreytir eru sambært sáttmála millum kommunalu arbeiðsgevarafeløgini og Føroya Pedagogfelag.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skal vera Barnagarðinum í hendi í seinasta lagi 20. mei 2002 kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran á tlf. 314373.

**Barnagarðurin við Vebastaðvegin**
Velbastaðvegur 41
FO-ba100 Tórshavn

**P/F Bakkafrost søkir eftir**
# teldukønum
**fólki K/M**

**Arbeiðið:**
- Skráseting/skjalfesting í framleiðsludeildini.
- Merking av liðugtvøru
- Gera avskipingarskjøl
- Ymiskar skrásetingaruppgávur

**Førleikakrøv:**
- Góð samstarvsevni
- At tú hevur hollan kunnleika til vanligu telduforritini, Word og Excel
- At tú ert nærløgd/nærlagdur
- At tú hevur prógv frá Miðnámsskúla

**Løn:** Sambært avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt og helst áðrenn 15. juni.

*P/F Bakkafrost heldur til á Glyvrum. Felagið hevur egna smolt- og alistøð. Virkið framleiðir frystar liðugtvørur beinleiðis til handlar, serliga á meginlandinum. Tilsamans arbeiða eini 120 fólk í øllum deildunum og samlaða sølan er umleið 150 mió. kr.*

BAKKA FROST

**Tlf. 447485**


Sosialurin
www.sosialurin.fo


# Frá Fa. Urtagarðsrøkt

Vit hava maskinur til velting og annan grevstur.

Vit hava amboð til flutning av mold og øðrum tilfari, har vanlig akfør ikki sleppa framat.

Eisini laða vit garðsløg úr hagagróti.

**Fa. Urtagarðsrøkt**
v/Mass Jensen
tlf. 327131 ella 283953

# Frisørsveinur

Søkt verður eftir ungum og friskum frisørsveini at arbeiða saman við okkum á eini nýggjari salong.

Áhugaði kunnu ringja á tlf. 458001.

**Klinik og Salong Afrodite**
Bumshamarsvegur 9 í Klaksvík

# Kvinnuskeið um sjálvsmenning

**Ert tú konufólk og hevur áhuga fyri at menna teg persónliga, hevur júst hetta skeið kanska tín áhuga.**

Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Stofflág 82 í Havn, í døgunum 1.–2. juni í ár frá kl. 9.00 – 17.00 báðar dMiðagar.

Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaður er kr. 1.850,– íroknað skeiðtilfar og kostarhald.

Skeiðleiðari er Anette Sundby. Hon er upprunaliga útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 12 árini skipað fyri skeiðvirksemi.

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at venda sær til Sigrún Mohr, tlf. 315298, ella til Anette Sundby, tlf. (+45) 45424650, t-post: email@anettesundby.dk. Eisini ber til at fara inn á heimasíðuna www.anettesundby.dk.


Langur Leygardagur

Alt ÷ 20%

Opið til kl. 17.00



MINA WILHELM
N. Finsensgøta 31 • Tel. 31 16 73


# OLDFRÚA

**Vit sóknast eftir tilkomnum fyristøðufólki.**

**Arbeiðið fevnir m.a. um at fyriskipa reingerðina, og at samskipa arbeiðið á gestarúmum og í hølum okkara.**

**Talan er um eitt ábyrgdarfult leiðarastarv á einum fjøltáttaðum arbeiðsplássi.**

**Vit vænta at viðkomandi er:**
- **fyrikomandi**
- **ágrýtin og nærlagdur**
- **dugir at arbeiða sjálvstøðugt**
- **hevur góð samstarvsevnir**
- **hevur royndir innan reingerðararbeiði**

**Starvstíð:**
**Mánadag - sunnudag kl. 8.00 - 15.00 aðru hvørja viku. Svarandi til tímatal 106 um mánaðin, sum er uml. 60% av fullari starvstíð.**

**Starvið verður at setast skjótast gjørligt.**
**Løn sambart avtalu.**

**Hevur hetta tín áhuga, kanst tú frætta nærri um starvið, við at venda tær til Ásu Johnsdóttir ella Hardis Johannesen á tel 31 32 33**

***Umsóknir skulu sendast:***
**HOTEL HAFNIA**
**Postboks 107**
**FO-110 Tórshavn**
**E-mail: hafnia@hafnia.fo**
**Fax: 31 52 50**

HOTEL HAFNIA

Við

# Miðnámsskúlan í Suðuroy

eru nøkur størv, sum lektari/adjunktur/royndarsettur adjunktur/tímalærari frá 1. august 2002 leys at søkja í **studentaskúlalærugreinunum:**

- **Alis-/Evnafrøði** (5)
- **Lívfrøði** (5)
- **Latín** (3)
- **Franskt** (10)
- **Samfelagsfrøði** (15)
- **Sálafrøði** (4)
- **Tónleik** (10)
- **Leiklist** (4)
- **Geografi** (3)

Eisini er eitt starv sum ársvikarur í **religión, søgu og fornaldarfrøði** leyst at søkja.

Setan fer fram sambært sáttmála millum Føroya Landsstýrið og Yrkisfelag studentaskúla- og HF-lærara (YF).

Umsóknin á oyðublað frá YF verður stílað til Føroya Landsstýrið, Undirvísingar- og mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent til:

**Miðnámsskúlin**
Att.: Ole V. Laursen
FO 900 Vágur
Tlf. 373622 • Fax 374026 • e-mail: leidslan@midnam.fo

Umsóknir skulu verða skúlanum í hendi í seinasta lagi 16. mai 2002.